# Familjuhugni fyr



*Familjukonsertirnar hjá Føroyar Symfoniorkestri í Norðurlandahúsinum og í ítróttarhøllini í Runavík vóru sera góðar og undirhaldandi*

Føroya Symfoniorkestur skipaði fyri familjukonsertum fyrsta vikuskiftið í desember. Einari í Norðurlandahúsinum og einari í ítróttarhøllini í Runavík. Hetta er ein liður í at fáa Føroya Symfoniorkestur veruliga at liva upp til sítt heiti, sigur formaðurin í orkestrinum Poul Jákup Thomsen

KONSERT
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*
*Myndir: Jonhard Hammer*



*Connie sang solo undir upplestrinum og spælinum av ævintýrinum Snowman*

Tvær familjukonsertir og knapt 1.000 áhoyrarar tilsamans. So væl eydnaðist fyrsta royndin hjá Føroya Symfoniorkestri at skipa fyri familjukonsertum og harvið røkka einum øðrum málbólki í samfelagnum enn hinar konsertirnar, sum orkestrið vanliga skipar fyri.

Poul Jákup Thomsen, formaður í orkestrinum, sigur, at hetta eydnaðist betur, enn tey tordu at vóna undan konsertunum.

Í Norðurlandahúsinum var fullsett, 650 fólk, og í Runavík møttu yvir 300 fólk upp.

– Vit høvdu vónað yvir fólk 200 í Runavík, so tú kanst ætla, at vit eru vælnøgd, sigur ein fegin formaður í orkestrinum.

Hann heldur, at hetta var ein væleydnað roynd at fanga áhugan hjá børnunum og harvið røkka málinum, sum er, at orkestrið skal vera fyri allar føroyingar.

– Orkestrið er nú 21 ára gamalt, og forstáilsi fyri virðinum í okkara arbeiði, er munandi økt seinnu árini. So er bara at vóna, at myndugleikarnir eisini síggja tað og fara at økja játtanina, tí tónleikurin nørist væl í okkara landi, sigur Poul Jákup Thomsen.

## Frásøgn

Tónleikurin á konsertini var sjálvandi valdur út til børn. Millum annað las Eyðun Johannesen ævintýrið Snowman. Um ein lítlan drong, sum droymir um, at hann og ein kavamaður eru á ferð.

Meðan Eyðun las, syrgdi orkestrið fyri ljóðeffektunum, og hetta riggaði avbera væl. Eisini var ein solo í ævintýrinum, og hana sang ein genta, sum eitur Connie.

Børnini sótu sum á nálum og lurtaðu eftir.

Orkestrið spældi eisini temalagið til Stars Wars. Poul Jákup sigur, at hetta var eitt verk við nógvum larmi, og tískil fall tað í góða jørð hjá børnunum.

– Tað verkið dámdi teimum sera væl, sigur hann.

Men tað var ikki bara Føroya Symfoniorkestur, sum framførdi á konsertunum. Eitt barnakór, samansett av 150 børnum úr Eysturoynni og høvuðsstaðnum, sungu kendar jólasangir, meðan orkestrið spældi afturvið.

Tað var Atli Petersen, tónleikalærari í Vestmanna, sum hevur skrivað út tónleikin til barnakór og symfoniorkestur.

## Børnini stjórnaðu

Dirigentur hjá Føroya Symfoniorkestri er hálvi føroyingurin Benny Wilkinson. Hann er hálvur sumbingur, men er annars úr London. Hann er útbúgvin tónleikari og hevur arbeitt nógv í Reykjavik. Eisini hevur hann stjórnað fleiri kendum symfoni-